# ego robottar

- Vit komu rættiliga seint í gongd, men børnini hava verið ófør. Vit hava sæð, at nógv av børnunum, ið ikki vanliga klára seg so væl, veruliga hava klára seg væl. Kreativitetur og gott handalag hava blomstrað, sigur Beinta Jacobsen, ið er lærarin hjá flokkinum í samband við FIRST LEGO League.

## Ódnir

Evnið til ástøðiligu uppgávuna er veðurlagsbroytingar. Børnini á Eiði hava valt evnið ódnir, og arbeitt eitt sindur við teimum.

- Børnini hava funnið hagtøl fram, tosað við fólk um jólaódnina og verið niðri á Møl fyri at kanna hvussu tað var, tá ódn var og vegurin yvir um Mølina fór. Eisini hava tey kannað yvirflóðir og gjørt model av, hvat hendir á Eiði, um tað skuldi floymt inn av Mølini. Hetta hava tey samanborið við Danmark og meta loysnina vera verjugarðar, greiðir Beinta Jacobsen frá.

## Koyri á

Seinasti parturin av kappingini er at gera eina framløgu av arbeiðinum hjá liðnum. Í hesum sambandi hava børnini á Eiði verið úti í Nólsoy, har tey hava spælt eitt lag inn.

- Vit hava havt samband við Terja Rasmussen, ið hevur hjálpt okkum við sanginum. Lagið er »Koyri, koyri á«, sum er heitið á einum EB/Streymssangi, men orðini eru broytt, fortelur Beinta Jacobsen.

## Vilja vinna

Tað er onki dulsmál, at eiðisbørn vilja vinna FIRST LEGO League, men høvuðsorsøkin er hvørki heiður ella æra.

- Eg hopi vit vinna, tí so sleppa vit frá at hava vanliga skúlagongd og skúlating, hevur ein limur í Genius Green Team nevniliga sagt. So tað er líkt til, at børnini hava sera stóran gleði av kappingini.

So er bara at vón, at onki Frankenstein ódjór verður at síggja, tá stóra kappingin byrjar í morgin.





*Munurin fyri og eftir yvirflóð frá Mølini á Eiði*






*Í Genius Green Team eru fýra dreingir og fimm gentur*

## FIRST LEGO League

Søgan hjá FLL

FIRST LEGO League er ein kapping, ið hevur sínar røtur í USA, har fyrsta kappingin eisini varð hildin. Hetta var í 1999. Í 2000 var fyrsta kappingin hildin í Norðurlondum. Tá luttóku 13 lið, og síðani tá er kappingin bara vaksin, og í ár eru yvir 14.000 børn við úr Norðurlondum.

Í nøkur hevur kappingin verið í Føroyum, og eitt lið á Skála megnaði einaferð at gerast næstbesta liðið í danska kongaríkinum, har tey eisini avgjørdu at fara í eina kapping í USA.

Kappingin er ætlað, sum ein partur av menningini hjá børnum í mun til tøkni. Eisini skal kappingin stimbra støddfrøðiliga og náttúruvísindaliga áhugan hjá børnum.

Nógvur stuðul verður latin frá fyritøkum, tí mett verður at tað fara at vanta fólk við tøknініligari vitan, og hetta gevur sambært børnum eina øðrvísi skúlauppgávu, sum hugtekur børnini nógv.

Climate Connections